

*Frá fundinum á tinghusloftinum í farnu viku. Formaðuri í oljuráðleggingarnevndini, Árni Olafson kunna tingmenn um gongdina í oljumálinum. Mynd kalmar*

*Marita Petersen, tingformaður eftir oljufund:*

# -Kenni meg trygga við gongdina higartil

*-Sera umráðandi at tingmenn draga eina línu í oljumálinum. Tað hevur ikki minst týdning úteftir heldur Marita Petersen, tingformaður, sum í farnu viku kallaði tingmanningina saman til at lurta eftir oljuráðleggingarnevnd og seta spurningar*

Í farnu viku var heldur óvanligur fundur í tinghúsunum Marita Petersen, tingformaður hevði boðsent tingmonnum at koma at lurta eftir oljuráðleggingarnevndini og teimum fólkum, sum hava tilknýti til føroysku oljufyrisitingina

Hetta var ein sera góður fundur, har vit høvdu høvi at seta spurningar og fingu kunning um, hvussu landið liggur sigur Marita Petersen

Uppmøtingin var góð og nógv varð spurt Tosað varð um bæði komandi løggávuna, skattaspurningar í sambandi við eina møguliga oljuvinnu, um umhvørvisspurningar o.l.

Hon vísir á, at talan er um eitt so stórt og álvarsligt mál, at tingmenn eiga at verða kunnaðir um tað Her hugsar hon ikki minst um teir mongu nýggju tingmenninar, sum komu inn eftir síðsta val

Tað er annars Marknaðarnevndin, sum hevur undirgrundarspurningin sum sítt málsøki, men eg haldi tað er rætt, at allir tingmenn verða kunnaðir um gongdina og støðuna í málinum sigur hon

Tingrformaðurin, sum sjálv umsat undirgrundina, tá hon var løgmaður, er sera fegin um gongdina higartil Hon heldur, at tað hevur gingið skjótt Tað hevur ikki verið drálað, men tað hevur so heldur ikki gingið skjótari, enn tað er forsvarligt

Marita Petersen, sum sjálv var við til at seta út í kortið kósina fyri kanningum í sambandi við eina komandi oljuvinnu, kennir seg eisini trygga við tey fólk, sum arbeiða við málinum

**Professionelt**

-Tey arbeiða sera professionelt og tað haldi eg er gott. Fólkini eru eisini væl kvalifiserað til at røkja arbeiði, sum hevur tilknýti til oljuspurningin

Marita Petersen sigur, at tað er sera umráðandi, at tingmenn standa saman sum ein maður og draga somu línu í oljuspurninginum

Tað hevur ómetaliga nógv at siga, at vit standa saman ikki minst úteftir Eisini at tey mongu fólk, sum í útlandinum, vilja koma í samband við okkum, vita, hvønn tey skulu tosa við

Marita Petersen ber ikki ótta fyri, at vit her skulu fáa ein stóran almennan stovn aftrat, sum bara fer at kosta okkum pengar.

-Eg haldi, at tey hava verið sera varin við at seta fólk, men tað er greitt, at uttan mun til um vit finna nakra olju ella ikki, so er neyðugt við einum ávísum tali av starvsfólki at arbeiða við hesum heilt nýggju málunum

Tingformaðurin heldur, at finna vit olju, so verður tað heilt víst brúk fyri fleiri fólkum í umsitingini Kortini fer leitingarvirksemið at hava við sær, at her liggur eftir nakað av arbeiði, soleiðis at talan verður ikki um nakað undirskot av hesum

**jan**



*Marita Petersen, tingformaður bjóðar tingmonnum og oljufólki vælkomnum í tingið. Mynd kalmar*

## VALUTAKURSIR

| | | 28.03.95 | Ultimo síðsta mán. |
|---|---|---|---|
| *USA* | **Dollari** | 557,05 | 581,75 |
| *Bretland* | **Pund** | 892,23 | 919,92 |
| *Týskland* | **Markur** | 397,52 | 397,32 |
| *Svøriki* | **Króna** | 76,22 | 78,96 |
| *Noreg* | **Króna** | 89,24 | 89,71 |
| *Frakland* | **Frankur** | 112,77 | 112,82 |
| *Belgia* | **Frankur** | 19,299 | 19,287 |
| *Sveits* | **Frankur** | 482,09 | 468,59 |
| *Holland* | **Gyllin** | 354,70 | 354,23 |
| *Italia* | **Liri** | 0,3275 | 0,3468 |
| *Finnland* | **Markur** | 126,69 | 128,25 |
| *Ísland* | **Króna** | 8,73 | 8,83 |
| *Eysturríki* | **Skillingur** | 56,479 | 56,448 |
| *Spania* | **Pesetas** | 4,324 | 4,523 |
| *Portugal* | **Escudos** | 3,779 | 3,826 |
| *Kanada* | **Dollari** | 397,72 | 418,46 |
| *Japan* | **Yen** | 6,2541 | 6,0104 |
| *Írland* | **Pund** | 895,62 | 917,30 |
| *Grikkaland* | **Drakmur** | 2,433 | 2,495 |
| | **XEU** | 726,78 | 738,59 |

Kelda: **Føroya Sparikassi**

**BYGDARHÚSIÐ í Hósvík**

Sera hugnaligt og nossligt hús, við øllum hentleikum, biliga til leigu til fundarvirksemi, veitslur, brúdleyp, føðingardagar o.a.

Steintoy er í húsinum og vit kunnu borðreiða fyri 300 fólkum í salinum.

Eisini leiga vit steintoy út.

**BYGDARFELAGIÐ VARÐIN**
**Tlf. 22336**

**Hús í Íslandi**

Eg eigi eini eldri hus í Grindavík, sum eg fegin vil býta um við hus í Torshavn ella Kollafirði.

Í Grindavík er nógv arbeiði.

**Tlf. 009-354-2-68471 – Jón**